# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Ommu til minnis

Tung vóru boðini 2. apríl, at omma var farin. Hóast omma hevði verið sjúk og veik í mong ár, kendist tað onkursvegna fjart og óveruligt ongantíð at skula hoyra hennara hjartaliga látur og merkja hennara hita aftur.

Omma og abbi hava, alt tað eg kann minnast, verið tann savnandi miðdepilin í familjuni. Serliga sum smádrongur at koma oman Stóragarð at vera hjá teimum vóru góðar, ríkar og minniligar løtur. Ikki minst tá onnur av mínum systkinabørnum eisini vóru har. Omma gjørdi avbera góðan mat – hon var tiltikin góður kokkur - og omaná plagdu vit at fáa rabarbugreyt vid sukri og mjólk afturvið.



*Marita P. Mohr*

At omma og abbi vóru miðdepilin í familjuni, kom serliga væl til sjóndar hvønn fyrsta jóladag, tá ið øll familjan savnaðist heima hjá teimum til jóladunnu og rís à la mande. Vit plagdu tá at vera eini 25 fólk saman í hugnaligari samveru. Sera virðismikil minni, sum hava serliga ríkað mær barndómin.

Tað var svárt og tungt at síggja ommu følna burtur tey seinnu árini vegna ta eirindaleysu sjúkuna, hon fekk. Sum útiseti sá eg bara ommu tær ferðir, eg var á vitjan heima í Føroyum. Munur sást hvørja ferð, eg var hjá henni á Lágargarði, har hon búði seinastu 5 árini. Alzheimers fer fyrst og fremst við minninum, men tað var altíð deiligt at vitja ommu – hon kendi altíð andlit aftur og var so glað fyri at hava familjuna hjá sær. Hóast omma viknaði og svann, misti hon ongantíð tað lætta lyndið – tað var vanliga ikki langt millum smílini. Komu smábørn á vitjan, lýsti gamla upp.

Omma er nú farin og stríðist ikki meir. Hon hevur loksins fingið frið. Fátøk orð røkka ikki í lýsingini av eini so stórari og ríkari menniskju. At hon var nakað heilt serligt, sást eisini í kirkjuni, sum var stúgvandi full av familju, vinum og kenningum, tá ið omma fór til gravar. At enda vil eg í sorgblíðni bara takka fyri alt tað góða, omma stóð fyri, og lýsa frið yvir minnið um mína kæru ommu.

**Herman**

†

## Andlát og jarðarferðir

Jarðarferðin hjá **Janusi Kamban, myndahøggara, Tórshavn**, verður úr Havnar Kirkju hósdagin kl. 13.00.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri pápi, verpápi, abbi og beiggi okkara

**Klávus Sólheyg (Javi)**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til Hanus Simonsen, prest, fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni. Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravarar. Ein serstøk tøkk til Heimarøkt, Heimasjúkrasystrar og Deild M.
Hjartans tøkk til øll tykkum fyri ta stóru hjálp, ið tit á ymiskan hátt veittu okkum við jarðarferðina og ervinum.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Lena, Jóhanna, Anita og Klávus**

## Nýggja manskórið í Ebenezer

*Poul Jóhan Djurhuus*
*Gjaranes@post.olivant.fo*



Brøðrasamkomurnar hava í mong ár verið ramman um góðan og ríkan kórsang, sum hevur sett sín dám á tey vanligu sunnukvøldsmøtini og ikki minst á árligu samfelagsstevnurnar kring landið. Bæði Ebenezer og Betesda hava havt sangkór í mannaminni. Hvør kennir ikki Betesdakórið og Ebenezerkórið!

Fyri tveimum árum síðani, beint undan samfelegsstevnuni í Ebenezer í november í 2007, tóku menn stig til at stovna eitt manskór í Ebenezer. Eli Smith var ein av stigtakarunum. Eli fór at tosa við menn um ætlanina, og beinanvegin stillaðu uml. 40 mans upp til eitt manskór, sum sang longu fyri stúgvandi fullari høll á Nabb, tá samfelagsstevnan var í 2007. Jens Christian Guttesen og Eli Smith stjórna kórinum. Eli sigur, at menninir í dupultkvartettini í Ebenezer vóru longu við í byrjanini, og gjørdist tann berandi ryggurin í sjálvum startinum.

Fólk tóku ómetaliga væl ímóti hesum nýfødda "tónleikabarninum." Í dag eru uml 60 mans í kórinum. Luttakarnir eru fyri tað mesta úr Suðurstreymi. Eli sigur, at menn allastaðni frá í landinum eru vælkomnir at vera við. Onkur av luttakarunum býr í Oyndafirði. Tað krevst einki meiri enn at ein syngur nøkunlunda reint. Kórið skal eisini síggjast sum eitt sosialt átak, har roynt verður at savna menn um góðan sang og góðan kristnan felagsskap.

### Ynskja at ferðast

Leiðslan í kórinum sigur, at hon ynskir at koma runt landið at syngja, bæði í samkomum og almennum hølum. Í januar í ár vóru teir á einari sunnudagstourné, tá teir vitjaðu á trimum støðum: Á Eiði til morgunmøti, í Hebron í Leirvík seinnapartin og í Betesda í Klaksvík, á sunnukvøldsmøtinum. Í næstum er ætlanin at vitja á Sandoynni og í Vágunum.

Leygarkvøldið 02. mei sungu teir fyri fullum hølum á evangeliskum fundi í cafeteriuni í ítróttarhøllini á Skála. Sunnudagin 03. mei vitjaði kórið í Bethel í Vági.

Teir kundu hugsa sær at farið uttanlanda, men enn er eingin ítøkilig ætlan um tað, men Birgir Andreassen, sum syngur við í kórinum, eigur ein stóran missjónsbuss, og hann er ógvuliga spentur upp á, at bussurin kann vera ramman um eina tónleikaferð til útlandið. Undir samtaluni við Eli nevndu vit Íslendsku kallakórini, sum eru tiltikin góð. Eli sigur, at tað hevði verið stuttligt um ein túrur kundi verið gjørdur til Íslands, og tað kundi eisini verið íblástur hjá monnunum, at møtt og hoyrt okkurt av teimum gitnu Íslendsku kallakórunum.

Kórið hevur ikki fastar venjingartíðir, hetta tí, at fleiri av monnunum eru í øðrum kórum, sum venja regluliga, og menninir hava nógv at takast við ígjøgnum vikuna. Tað er ikki skilagott at leggja fleiri byrðar á teir, men tá ein vitjan er fastløgd, so verður vant regluliga frammanundan. Eli sigur, at skal man hava eitt kór og skal man syngja í einum kóri, so sleppur en ikki undan at venja undir einum ella øðrum formi. Annars sigur Eli, at "nógvir av sangarunum eru ógvuliga "svangir" og spyrja meg ofta nær vit aftur fara út at syngja... vit hava fingið nógvar reaktiónir frá fólki...øgiliga nógv fólk eru glað fyri kórið og dáma væl at hoyra okkum........nógvir eru eisini glaðir fyri at sleppa at vera við og føla at teir eru við í tænastuni at syngja."

Eli hevur tikið stig til sangkór áður. Fyri 10 árum síðani, í 1999, byrjaði Eli eitt dreingjakór í sínum egna grannalagi í Havnini, og kórið kom at eita "Dreingjakórið Undir Brúnni." Hetta eru dreingir undir skúlaaldur og upp til 12 ár. Fyri einum ári síðani kendi Eli tað soleiðis, at nú var tað vorðið ov nógv hjá sær, nú hann eisini hevði manskórið. Hann vildi tó ikki leggja kórið niður, men hevur fingið tvær dugnaligar kvinnur at loysa seg av; tær eru Hanna Jensen og Marta Dalsgarð.

Tað hevur ikki verið tann stóra traditiónin fyri manskórum í brøðrasamkomunum í Føroyum, men fyri mongum árum síðani royndu slíkir tónleikagarpar sum Viggo Dahl Christiansen, Jens Guttesen og Knút Háberg at hava eitt manskór í Ebenezer, sum var virksamt í eitt ávíst tíðarskeið. Vit ynskja nýggja manskórinum góðan byrð og nógv ár á sangleiðini og vóna, at teir skjótt sleppa at royna maskulinu røddirnar uttanfyri landoddarnar.

**100 ára føðingardagur**
Mikudagin 6. mai verður Ellen Lützen, Tórshavn, 100 ár. Dagurin verður hildin á Lágargarði kl. 15.00-17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
Í mai verði eg 60 ár. Føðingardagin haldi eg í Sjónleikarhúsinum mikudagin 20. mai, kl. 19.00. Tey, ið hava hug at halda veitslu saman við mær, verða biðin um at boða frá á telefon 317029 ella kdjurhuus@olivant.fo áðrenn 13. mai.
**Heilsan Karin Djurhuus, fysioterapeutur.**

**Dagurin**
**6. mai. (Johannes ante portam).** Dagurin hildin til minnis um at ápostulin Jóhannes varð illa píndur uttan fyri borgliðið Porta Latina í Róm. Hann komst undan, men varð seinni rikin í útlegd út á oynna Patmos. Jóannes Patursson varð føddur hendan dagin í 1866, og Hans Andrias Djurhuus doyði hendan dagin í 1951.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*